# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg hoyrdi drongin gráta, so eg skundaði mær at taka hann og rann út. Tað lukkaðist*
*kvinna á hotelli í Mumbai*

# Komu kanska við rændum trolara

**Indisku myndugleikarnir halda, at yvirgangsmenninir í Mumbai komu hagar við skipi.**

Kanningar hjá indisku løgregluni hava avdúkað at yvirgangsatsóknin at málum í Mumbai fyrradagin var sera væl fyrireikað, og nógv bendir á, at yvirgangsmenninir hava fyrireikað seg í fleiri mánaðir.

Kapil Sibal, sum er ráðharri í vísindi og tøkni, sigur við blaðið The Times of India, at yvirgangsmenninir høvdu gjørt sokallað „eftirlitsrúm“ á hotellunum Taj og Trident Oberoi med «kontrollrom». Tað vísti seg eisini, at teir vóru gjølla kunnaðir um, hvussu hotellini eru innrættað, og tí ivast ráðharrin ikki í, at tað eru fleiri mánaðir, síðani atsóknirnar vórðu lagdar til rættis.



*Hesin bretski ferðamaðurin var millum gíslarnar, sum blivu fríaðir*

*Mynd: Polfoto*

## Trolari hvarv

Indisku myndugleikarnir eru sannførdir um, at yvirgangsmenninir komu til Mumbai við flogfari ella eftirsjónum. Løgregluovastin heldur, at teir komu við skipi, og at teir komu til lands við smáum gummibátum.

Eitt hugsan hjá løgregluni er, at yvirgangsmenninir kunnu vera komnir við einum indiskum trolara. The Times of India skrivar frá keldum í løgregluni um ein trolara, sum hvarv fyri 14 døgum síðani. Trolarin fór til fiskiskap tann 14. november á einari fiskileið úti fyri marknaleiðini millum India og Pakistan, men reiðaríið misti sambandið við hann. Tá indiska sjóverjan kom fram á trolaran, var bara líkið av skiparanum at finna. Nú heldur løgreglan, at yvirgangsmenninir rændu trolaran og noyddu skiparan at sigla teir til Mumbai-leiðina.

## Tamarhald á støðuni

Indisku myndugleikarnir søgdu fyrrapartin, at herurin hevði tamarhald á støðuni í Mumbai. Sagt varð, at nógv teir flestu gíslarnir vóru fríaðir, og at støðan á hotellinum Trident Oberoi var komin í rættlag. Á hinum hotellinum, Taj Mahal, var kanska ein yvirgangsmaður eftir.

Samstundis varð sagt, at servandi hermenn høvdu lopið á eina jødiska støð í Mumbai, har yvirgangsmenninir tóku fleiri fólk gíslar fyrradagin. Tað ljóðaði í gjárkvøldið, at Ísrael hevði sent servandi hermenn til India at hjálpa indiska herinum.



*Indiskir løgreglumenn eygleiða støðuna uttan fyri Trident Oberoi-hotellið*

*Mynd: AP*

Indiska forsætisætismálaráðið sigur, at minst 125 fólk doyðu í yvirganginum í Mumbai, og at umleið 300 vórðu særd ella fingu skaða.

## STUTT SAGT

### Heimsins elsta kvinna deyð

Amerikanska Edna Parker, sum doyði fyrradagin, var elsta kvinna í heiminum. Hon var følld tann 20. apríl í 1893 og var sostatt 115 ár og 220 dagar, nú hoin doyði á einum ellisheimi í býnum Shelbyville í statinum Indiana. Í metbókini hjá Guinness stendur, at bara 13 fólk hava lkivað longri enn Edna Parker.

Edna Parker bleiv einkja longu í 1939, tá maður hennara doyði. Hon búði einsamøll á einum garði, líka til hon varð 100 ára gomul. Tá flutti hon fyrst inn til sonin at búgva, men fór seinni á ellisheim.

Sjálvt um Edna Parker ongantíð rørdi rúsdrekka ella tubbak, vildi hon ikki siga øðrum, hvussu tey skuldu gera fyri at røkka líka høgum aldri sum hon. Hennara einasta tilmælið var, at fólk skuldu gera alt fyri at fáa sær eina so góða útbúgvin, sum til bar. Sjálv var hon lærari í rokning á sínum yngru árum.

Av tilvild kom Edna Parker at vera á sama ellisheimi sum Sandy Allen, ið sambært Guinnes var heimsins største kvinna. Sandy doyði í august, og nú Edna eisini er farin, hevur ellisheimið í Shelbyville mist bæði tey kendu búfólkini, skrivar AP.



*Edna Parker var heimsins elsta kvinna*

*Mynd: AP*

# Kunnu útrudda HIV innan tíggju ár

**Við álítandi kanningum og góðari viðgerð ber tað til at beina fyri virusinum, sum elvir til eyðkvæmi**

Heimsheilsustovnurin WHO er bjartskygdur um bardagan ímóti eyðkvæmi. Í einari nýggjari frágreiðing skrivar stovnurin, at útrokningar vísa, at tað ber til at vinna bardagan - á pappírinum í hvussu er. Í frágreiðingini, sum er prentað í teirri seinastu útgávuni av tíðarritinum The Lancet, vilja leiðandi granskarar vera við, at tað ber til at útrudda HIV-virusið innan tíggju ár.



*Tað ber til at útrudda eyðkvæmi, men tað verður dýrt*

*Mynd: AP*

Frágreiðingin byggir á royndir í Suðurafrika og Malawi, har læknar hava kannað fólk á hvørjum ári og givið teimum, sum vístu seg at hava smittuna, heilivág. Hetta saman við øðrum átøkum so sum upplýsing um fyribyrging hevur gjørt, at talið á nýggjum HIV-tilburðum er minkað 95 prosent tey seinastu 10 árini.

WHO sigur, at verður framferðin í Suðurafrika og Malawi brúkt um allan heimin, verður talið á teimum, sum doyggja av eyðkvæmi, minni enn fýra milliónir um árið innan 2050. Í løtuni er talið 8,7 milliónir.

Men hesi átøk eru dýr. WHO sigur, at skal sama framferð brúkast um allan heimin, verður kostnaðurin knappar 25 milliardir krónur um árið.